

## Fíggjarmálaráðið avsannar rossahandil

Fíggjarmálaráðið avsannar staðiliga søguna í Degi & Viku í gjárkvøldið um, at ein rossahandil er inngingin millum landsstýrismannin í fíggjarmálum og limir í Tvøroyrar býráð. - At dagbøturnar, sum vórðu álagdar ávísum býráðslimum, eru sleptar, er einans eitt úrslit av, at Tvøroyrar býráð nú hevur broytt roknskapirnir fyri 2007 og 2008 sambært roknskaparkrøvunum í Kommunustýrislógini. - Søgan í Degi & Viku um, at ein rossahandil er inngingin, er tí íspunnin. - Á fundinum millum landsstýrismannin í fíggjarmálum og Tvøroyar býrað 9. mei varð spurningurin um roknaskapirnar viðgjørdur. Men á sama fundi varð sjálvsagt eisini fíggjarstøðan hjá kommuni viðgjørd, nú inntøkurnar hjá kommununi eru minkaðar, og spurningurin um, hvussu kommunan ætlar at røkka ásetingini um, at lániskuldin ikki skal vera oman fyri eina álíkning. - Men her er talan um tvinnandi mál, sum Svf av ein ella aðrari orsøk royndi at tvinna saman, sigur Fíggjarmálaráðið í tíðindaskrivi.

Hummarmálið:

# Eidesgaard sleppur undan revsing

**Hóast Rás2 hevur ljóðbrot, har Jóannes Eidesgaard, sum tá var løgmaður, greiðir frá, at hann át livandi hummara á Atlantic Fish Fair í 2005, so verður hann ikki ákærdur fyri djórapínslu. Sjálvur vil hann ikki tosa um málið**



*- Tað var sanniliga eisini imponerandi at eta livandi hummara, at bíta í ein livandi hummara, og smakka, hvussu hann smakkar, segði Jóannes Eidesgaard í tíðindunum á Rás2 tann 5. mai 2005, men hann verður ikki ákærdur fyri grova skilaleysa viðferð ímóti hummarum, sum fimm onnur, sum í heyst skulu fyri rættin*

*Tilgjørd mynd: Álvur Haraldsen*

DJÓRAPÍNSLA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

*Hevur tú nakrantíð etið livandi hummara?*

- Hví spyrt tú?

*Dimmalætting hevur fleiri ferðir skrivað, at tú og fleiri hundrað onnur hava etið livandi hummara og nú koyrir eitt rættarmál. Í tí sambandi vil eg spyrja, um tú át livandi hummara í 2005. Um Dimmalætting bara finnur uppá, ella um tú hevur etið livandi hummara.*

- So sigi eg, at eg onga viðmerking havi. Tað er væl eisini ein viðmerking.

So einfaldar eru útsagnirnar hjá Jóannesi Eidesgaard, tá hann verður spurdur, um hann er ein av teimum fleiri hundrað fólkunum, sum royndu at eta livandi hummara á Atlantic Fish Fair í 2005, sambært Dimmalætting.

### Át hummara

Men Jóannes Eidesgaard hevur í hvussu so er sagt, at hann hevur etið livandi hummara, tí 5. mai í 2005 tosaði táverandi løgmaður við Rás2, har hann greiddi frá, hvat honum dámdi væl við Atlantic Fish Fair. Millum onnur upplivilsi á stevnuni nevndi hann at eta livandi hummara.

- Tað var sanniliga eisini imponerandi at eta livandi hummara, at bíta í ein livandi hummara, og smakka, hvussu hann smakkar, segði Jóannes Eidesgaard.

Men tá Jóannes Eidesgaard verður spurdur um hetta brot hevur hann somu støðu sum áður.

- Eg tosaði við teg um hetta í morgun, og mín støða er tann sama. Eg havi onga viðmerking, staðfestir Jóannes Eidesgaard.

### Kann ikki ákærast

Tá fjølmiðlar fyrr hava verið í samband við ákæruvaldið, um hví Jóannes Eidesgaard ikki er ákærdur í málinum, hóast Dimmalætting longu í maimánaði skrivaði, at hann var ein teirra, ið át hummara og Jóannes Eidesgaard ongantíð hevur avsannað hetta. Og ein kanska skuldi trúð, at hann er eins sekur og tey fimm fólkini, sum eru ákærd eftir grein 1 í djóraverndarlógini, so hevur ákæruvaldið, víst á, at ongi prógv eru fyri, at táverandi løgmaður át hummara, og at tað bara eru prógv ímóti teimum fimm fólkunum, sum vóru í málinum.

Nú Rás2 hevur ljóðbrot, har Jóannes Eidesgaard greiðir frá, hvussu imponerandi tað var at eta livandi hummara, so kundi hugsast, at táverandi løgmaður eisini kann ákærast, og kann rokna við at verða kravdur eftir 1000 krónum í bót fyri at hava givið hummaranum grova skilaleysa viðferð. Júst á sama hátt sum hini fimm.

Men tað verður Jóannes Eidesgaard ikki.

- Um hann hevur etið livandi hummara, so er fyrningarfreistin farin. Sambært paragraf 93 í revsilógini er fyrningarfreistin tvey ár fyri hetta mál, staðfestir Linda Hesselberg, almennur ákæri.

Hon greiðir somuleiðis frá, at hevði ákæruvaldið verið vitandi um hetta ljóðbrot, sum verður spælt á Rás2 klokkan 16 og 17 í dag, so hevði Jóannes Eidesgaard, táverandi løg-maður, eisini verið avhoyrdur í málinum.

### Undrast yvir upplýsingar

Hinvegin undrast Linda Hesselberg, at tað var so torført at finna upplýsingar í málinum, og at tað finnast tílík ljóðbrot, sum ákæruvaldið onki visti um.

- Tú skuldi vitað, hvussu lítið fólk sóu hesar dagarnar í mai 2005, staðfestir hon.

Somuleiðis greiðir hon frá, at tey, sum eru ákærd í málinum ikki hava greitt frá øðrum, ið hava etið av livandi hummarunum, og tí hevur verið sera torført at finna onnur av teimum næstan 1000 fólkunum, sum sambært Dimmalætting 25. mai 2005 ótu livandi hummara.

Sostatt kunnu øll tey fólkini, sum ikki longu eru undir ákæru vera viss í, at tey ikki verða ákærd fyri at hava etið hummara í 2005.